# Dátuverndarkunning til Korndalsgarð

Tá søkt verður um dagstovnapláss í Eiðis kommunu, viðger kommunan persónsupplýsingar um teg og barn títt. Í Eiðis kommunu viðgera vit persónsupplýsingar, sum eru neyðugar fyri at vit kunnu loysa okkara uppgávur tá ið vit veita børnum í kommununi dagstovnapláss. Tað er okkara ábyrgd at tryggja, at tú trygt kann lata Eiðis kommunu tínar persónsupplýsingar. So leingi barn títt gongur á dagstovni í kommununi viðgera vit upplýsingar um teg og barn títt.

**Endamálið við viðgerð av persónsupplýsingum**
Korndalsgarður hevur sum dagstovnur eina røð av uppgávum, sum innibera viðgerð av persónsupplýsingum, eitt nú í sambandi við innskriving av barninum. Vit viðgera t.d. navn og føðingardag hjá barninum, føra protokol við nær barnið er á stovninum os.fr. umframt samskiftisupplýsingar hjá foreldrunum/verjum, t.d. navn, bústað, telefonnummar o.l.

Vit viðgerða einans tær upplýsingar, sum vit hava tørv á fyri at røkja uppgávuna sum dagstovnur. Hetta kunnu vera vanligar persónsupplýsingar og viðkvæmar persónsupplýsingar, alt eftir hvat okkum tørvar fyri at røkja uppgávurnar. Korndalsgarður hevur m.a. brúk fyri heilsuupplýsingum um barnið, um barninum tørvar heilivág, hevur ovurviðkvæmi ella um onnur heilsuviðurskifti eru, ið vit hava tørv á fyri at kunna ansa tínum barni trygt. Vit taka og brúka eisini myndir av børnum, ið eru á stovninum, við tí fyri eyga at at kunna foreldur um dagliga virksemi, at skjalprógva námsfrøðiliga virksemið hjá stovninum og fyri eitt nú at hanga andlitsmyndir upp á skáp hjá børnum.

**Hvørjum letur Eiðis kommuna persónsupplýsingar?**
Vit nýta persónsupplýsingar um børn og foreldur í tí dagliga námsfrøðiliga arbeiðinum. Í ávísum førum lata vit persónsupplýsingar víðari, men sjálvandi einans tá ið heimild er fyri tí.

Vit kunnu eitt nú lata persónsupplýsingar víðari til okkara dátuviðgerar (uttanhýsis veitarar), sum t.d. veitara av journalskipan, intraneti o.s.fr. Uttanhýsis dátuviðgerar viðgera dátur okkara eftir nærri ásettum avtalum. Hesar avtalur innihalda skjalfest boð um, hvussu persónsupplýsingar skulu viðgerast, og at persónsupplýsingar bert kunnu viðgerast sambært hesum boðum. Vit kunnu eisini lata persónsupplýsingar víðari til myndugleikar og ráðgevar, sum vit skulu samskifta við í sambandi við málsviðgerð, eitt nú til avvarðandi Barnaverndartænastu og Sernám.

**Tíni rættindi**
Tú hevur altíð rætt til at fáa at vita hvaðani og hvørjar upplýsingar vit savna og skráseta um teg. Metir tú, at persónsupplýsingar, sum vit hava um teg eru skeivar, hevur tú rætt til at fáa hesar rættaðar.

Tú hevur eisini rætt til at fáa persónsupplýsingar um teg strikaðar. Hesin rættur er tó ikki treytaleysur, tá ávísir upplýsingar ikki mugu strikast grundað á aðra lóggávu, ella um avtala ella annað endamál gevur kvøldskúlanum rætt til at varðveita og viðgera hesar upplýsingar. Ynskir tú at nýta tíni rættindi í sambandi við persónsupplýsingar, skalt tú skriva til eidi@eidi.fo.

**Dátuverndarkunning hjá Eiðis kommunu**
Dátuverndarkunningin hjá Eiðis kommunu kann lesast **her**. Her kanst tú lesa nærri um, hvussu tú kanst seta teg í samband við Eiðis kommunu, hvussu kommunan viðger persónsupplýsingar í samband við teirra arbeiði sum kommunalur myndugleiki og tíni rættindi sambært dátuverndarlógini.